NORÐOYA SPARIKASSI

# HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2015

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Fuglafirði:
Í Støð 7
FO-530 Fuglafjørður
Tel. 475000

Deildin í Tórshavn:
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. 475000
Fax 476015

# Innihaldsyvirlit

| | | |
|---|---|---|
| LEIÐSLUÁTEKNING | s. | 3 |
| HÁLVÁRSFRÁGREIÐING | s. | 4 |
| RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR | s. | 7 |
| FÍGGJARSTØÐA HIN 30. JUNI | s. | 8 |
| ÚTGREINING AV EGINPENINGI OG SOLVENSTØRVI | s. | 9 |
| LYKLA- OG HØVUÐSTØL | s. | 10 |
| NOTUR | s. | 11 |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið hálvársfrásøgnina fyri 1. hálvár 2015 fyri Norðoya Sparikassa. Hálvársfrásøgnin er greidd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi herundir roknskaparkunngerð frá Fíggjareftirlitinum um fíggjarligar frásagnir hjá kredittstovnum v.m.

Tað er okkara fatan, at hálvársfrásøgnin gevur eina rættvísa mynd av sparikassans ognum, skyldum og fíggjarstøðu pr. 30. juni og úrslitinum fyri 1. hálvár 2015.

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað.

Klaksvík, hin 27. juli 2015.

Stjórn

Marner Mortensen

Nevnd

John P. Danielsen
*formaður*

Jóannes Hansen
*næstformaður*

Jóhanna á Tjaldrafløtti

Karl Heri Joensen

Petur Alberg Lamhauge

Frimodt Rasmussen

Julianna Thomsen

Guðrið Lava Olsen

Tummas Martin Sólsker

# Hálvársfrágreiðing

## Virksemi

Sparikassans virksemi er at veita fíggjarligar tænastur til privat og vinnurekandi viðskiftafólk og almennar stovnar um alt landið. Sparikassin ynskir at veita viðskiftafólkum sínum eitt fjølbroytt úrval av fíggjarligum tænastum og eisini eina holla, professionella ráðgeving.

## Fyrra hálvár í yvirskriftum - tryggleiki og støðufesti

- Úrslitið eftir skatt var eitt avlop upp á 6,2 mió. kr.
- Renting av eginognini eftir skatt var 3,4 %
- Ábyrgdarfæið øktist 33 %
- Ábyrgdarar fingu útgoldið rentu upp á 6 %
- Útlánini øktust 0,8 %
- Innlánini øktust 3,6 %
- Innlánsyvirskotið øktist 20 %
- Útlánsprosentið er 85 %
- Gjaldførisyvirdekningurin er 154 %
- Solvensurin er 18,1 %
- Solvenstørvurin er 9,6 %
- Solvensyvirdekningurin øktist til 8,5 % -stig

## Gongdin fyrra hálvár

Úrslitið áðrenn skatt fyrra hálvár gjørdist eitt avlop á 6,2 mió. kr. móti 7,2 mió. kr. sammett við sama tíðarskeið í fjør. Høvuðsorsøkin til broytingina í avlopinum er, at sparikassin í fjør hevði ein vinning uppá 1 mió. kr. við sølu av partabrøvum, sum sparikassin átti í Nets A/S í Danmark.

Verður sæð burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum hevði sparikassin eitt avlop av vanligum rakstri fyrra hálvár upp á 8,1 mió. kr. móti 8,7 mió. kr. fyri sama tíðarskeið árið fyri. Hetta er ein minking í vanliga rakstrinum upp á 0,6 mió. kr., sum í høvuðsheitum stavar frá lægri rentuinntøkum orsakað av lækkandi rentustøði, meðan tillagingar, sum sparikassin hevur gjørt í rakstrinum, ikki síggjast aftur í roknskapinum fyrr enn seinna hálvár.

Sparikassin hevur seinastu árini havt sum mál at minka um kredittváðan mótvegis stórum kundum og harvið styrkja solvensyvirdekningin enn meiri. Hetta hevur havt við sær, at solvenstørvurin fyrra hálvár lækkaði við 1,8 %-stigum, úr 11,4 % niður í 9,6 %. Harvið øktist solvensyvirdekningurin til 8,5 %-stig.

Á aðalfundinum í mars samtykti umboðsráðið at renta ábyrgdarpeningin fyri árið 2014 við 5 prosentum yvir ta til eina og hvørja tíð galdandi hægstu rentu fyri innlán upp á 12 mánaðar ella í miðal við 6 prosentum. Hesin rentupolitikkur verður óbroyttur í 2015. Ábyrgdarar kunnu í mesta lagi eiga kr. 300.000 í ábyrgdarpeningi, uttan at loyvi krevst frá nevndini.

Samanumtikið hevur gongdin í fyrra hálvári verið í samsvari við metingarnar og sparikassin er nøgdur við gongdina.

## ROKNSKAPARFRÁGREIÐING

### Netto rentu- og kostnaðarinntøkur

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar minkaðu úr 34,3 mió. kr. niður í 33,2 mió. kr. Lækkandi rentustøðið og miðvísa arbeiðið seinastu árini at minka um váðan, minkaðu um inntøkurnar við 1,1 mió. kr.

### Virðisjavnan

Onki avlop var á virðisjavnan fyri 1. hálvár 2015. Sama tíðarskeið í fjør vísti virðisjavnan eitt avlop upp á 1 mió. kr. Avlopið í

fjør upp á 1 mió. kr. stavaði frá, at sparikassin fyrra hálvár í fjør hevði ein vinning uppá 1 mió. kr. við sølu av partabrøvum, sum sparikassin átti í Nets A/S í Danmark.

## Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting

Útreiðslurnar til starvsfólk og fyrisiting lækkaðu úr 24,7 mió. kr. niður í 24,0 mió. kr. Lækkingin upp á 0,7 mió. kr. stavar frá lægri útreiðslum til starvsfólk og fyrisiting. Samlaða talið av ársverkum fyrra hálvár í ár lækkaði úr 45,4 niður í 41,8 sammett við sama tíðarskeið í fjør.

## Aðrar rakstrarútreiðslur

Hesin postur fevnir um gjald til Innskjótaratrygdargrunnin svarandi til 0,25 % av sparikassans dekkaðu nettoinnlánum. Samlaða gjaldið er 1 % og verður goldið yvir 4 ár - frá 2012 til 2015. Fjórða og seinasta gjaldið í 2015 er 3,1 mió. kr., harav helvtin er bókað í roknskapinum fyri 1. hálvár 2015. Eftir 2015 verður hetta gjaldið munandi lægri.

## Niðurskrivingar

Fyrra hálvár í ár niðurskrivaði sparikassin útlán og ábyrgdir við 1,8 mió. kr., sum er 0,6 mió. kr. minni í mun til fyrra hálvár í fjør, tá ið niðurskrivingarnar vóru 2,4 mió. kr. Sparikassin hevur framt stórar niðurskrivingar seinastu árini, men gongdin í niðurskrivingum seinasta árið ber boð um, at útlit eru fyri, at niðurskrivingarnar komandi árini fara at verða á einum lægri støði, enn vit kenna tað frá undanfarnum árum.

## FÍGGJARSTØÐA

Fíggjarstøða sparikassans øktist við 79 mió. kr. 1. hálvár 2015, úr 2.025 mió. kr. og upp í 2.104 mió. kr. Hetta svarar til eina øking upp á 3,9 %. Høvuðsorsøkin til vøksturin í fíggjarstøðuni er, at innlánini øktust við 3,6 %. Innlánini øktust við 65 mió. kr., úr 1.804 mió. kr. við árslok 2014 og upp í 1.869 mió. kr. 1. hálvár 2015. Útlánini øktust við 12 mió. kr., úr 1.535 mió. kr. við árslok 2014 og upp í 1.547 mió. kr. 1. hálvár 2015. Hetta er ein vøkstur í útlánum upp á 0,8 %.

## Gjaldføri

Gjaldførið hjá sparikassanum er gott. Fyrra hálvár í ár var yvirdekningurin í mun til lógarkravið 154 % ímóti 123 % við ársenda í fjør - hetta er ein øking uppá 31 % -stig. Sambært eftirlitsdiamantinum hjá Fíggjareftirlitinum er minstamarkið fyri yvirdekningi 50 %.

## Solvensur og solvenstørvur

Solvensurin hjá sparikassanum er góður. Fyrra hálvár í ár var solvensurin 18,1 % í mun til 18,2 % við ársenda í fjør.

Individuelli solvenstørvurin var uppgjørdur til 9,6 % 1. hálvár 2015, ið er 1,8 % -stig lægri enn við ársenda í fjør, tá ið hann var 11,4 %. Orsøkin til lækkingina í solvenstørvinum stavar frá, at sparikassin fyrra hálvár hevur minkað um kredittváðan mótvegis stórum kundum við tí fyri eyga at styrkja solvensyvirdekningin enn meira.

Sostatt hevur sparikassin ein solvensyvirdekning pr. 1. hálvár 2015 upp á 8,5 % -stig, móti 6,9 % -stigum við árslok árið fyri.

## Meting fyri 2015

Fyrra hálvár 2015 var avlopið 8,1 mió. kr., tá ið sæð verður burtur frá niðurskrivingum upp á útlán og virðisjavnan. Inntøkurnar fyri 2. hálvár verða mettar at verða á sama støði sum 1. hálvár, men sparikassin væntar tó, at tillagingar í rakstrinum 1. hálvár fara at síggjast aftur í rakstrinum 2. hálvár.

Í ársfrásøgnini fyri 2014 varð mett, at avlopið í 2015 fór at vera á sama støði sum í 2014, tá ið sæð verður burtur frá niðurskrivingum upp á útlán og virðisjavnan. Nú árið er hálvrunnið, er sparikassin framvegis av tí fatan, at metingin fer at halda. Tá sannlíkindi eru fyri, at niðurskrivingar fyri alt árið verða á einum lægri støði enn undanfarin ár, metir sparikassin, at góð útlit eru fyri, at avlopið eftir skatt fyri 2015 verður á sama støði sum í fjør.

## Eftirlitsdiamanturin

Fíggjareftirlitið setti í 2012 í gildi ein sokallaðan eftirlitsdiamant. Har verða nevnd fimm ávaringartekin, sum kunnu geva ábendingar um, at ein peningastovnur hevur ov høgan váða. Niðanfyri er ein stutt frágreiðing um, hvussu váði sparikassans er í mun til hesi ávaringartekin.

Samanumtikið er sparikassin væl innanfyri hesi fimm ávaringartekin:

- **Stórir kundar tilsamans** (skulu vera minni enn 125 % av basiskapitalinum): Stórir kundar tilsamans pr. 30. juni 2015 eru uppgjørdir til 50 % av basiskapitalinum.
- **Útlánsvøkstur** (skal vera minni enn 20 % um árið): Sparikassin hevði fyrra hálvár í 2015 ein útlánsvøkstur upp á 0,8 %.
- **Útlán til fastognir** (skulu vera minni enn 25 % av samlaðu útlánunum): Pr. 30. juni 2015 vóru útlán sparikassans til fastognir 6,0 % av samlaðu útlánunum.
- **Fíggjarluftall** (útlán/arbeiðandi kapitalur minus lánsbrøv við restáramáli undir 1 ár, skal vera minni enn 1): Sparikassin hevur uppgjørt fíggingarlutfallið til 0,75 pr. 30. juni 2015.
- **Gjaldførið yvir lógarinnar kravi** (skal vera størri enn 50 %): Sparikassin hevur pr. 30. juni 2015 uppgjørt gjaldførið yvir lógarinnar kravi til 154,1 %.

## Váðar og váðastýring

Ongar broytingar eru í váða og váðastýring sparikassans. Víst verður til frágreiðingina í ársfrágreiðingini fyri 2014.

## Hendingar eftir roknskapartíðarskeiðið

Eftir at roknskapartíðarskeiðið endaði 30.06.2015 hava ongar hendingar verið, sum ávirka fíggjarligu gongd sparikassans.

## Óvissur við innrokning og máting

Tær mest týðandi óvissurnar við innrokning og máting eru knýttar at virðisáseting av ognum og niðurskrivingum av útlánum og áogn. Leiðslan metir, at óvissurnar eru á einum støði, sum eru nøktandi í mun til hálvársfrásøgnina.

## Nýttur roknskaparháttur

Sparikassin hevur ongar broytingar gjørt í nýttum roknskaparhátti 1. hálvár 2015. Víst verður til ársfrásøgnina fyri 2014.

# Rakstrarroknskapur 1. halvár

| Nota | | 2015<br>1.000 DKK | 2014<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | 36.778 | 40.988 |
| 2 | Rentuútreiðslur | 8.370 | 9.928 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **28.408** | **31.060** |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 0 | 57 |
| 3 | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 4.990 | 3.368 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 152 | 219 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **33.246** | **34.266** |
| 4 | Virðisjavnan av virðisbrøvum, gjaldoyra o.ø. | -71 | 960 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 861 | 1.172 |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 23.977 | 24.677 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 665 | 642 |
| | Aðrar rakstrarútreiðslur | 1.387 | 1.470 |
| 6 | Av- og niðurskrivingar upp á skuldarar, netto | 1.814 | 2.433 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **6.193** | **7.176** |
| | Skattur | 0 | 0 |
| | **Hálvársúrslit** | **6.193** | **7.176** |

# Fíggjarstøða hin 30. juni

| Nota | | 2015<br>1.000 DKK | 2014<br>1.000 DKK | Ársendi 2014<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 254.616 | 190.021 | 174.586 |
| | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 28.527 | 33.470 | 36.371 |
| | Útlán til amortiserað kostvirði | 1.546.546 | 1.509.603 | 1.534.990 |
| 7 | Lánsbrøv til dagsvirði | 196.370 | 64.851 | 75.810 |
| 7 | Lánsbrøv til amortiseraðan kostprís | 15.194 | 128.526 | 133.159 |
| | Partabrøv o.a. | 10.390 | 13.939 | 10.411 |
| | Fastognir íalt | 23.686 | 38.028 | 23.810 |
| | Íløguognir | 8.633 | 22.710 | 8.633 |
| | Fastognir til egna nýtslu | 15.053 | 15.318 | 15.177 |
| | Aðrar materiellar ognir | 8.372 | 9.341 | 8.912 |
| | Aktuell skattaáogn | 0 | 59 | 0 |
| | Yvirtiknar ognir | 15.877 | 18.340 | 18.629 |
| | Aðrar ognir | 4.168 | 5.910 | 7.383 |
| | Tíðaravmarkingar | 443 | 450 | 443 |
| | **Ogn tilsamans** | **2.104.188** | **2.012.538** | **2.024.504** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur** | | | |
| | **Skuld** | | | |
| | Skuld til peningastovnar og tjóðbankar | 12 | 15 | 0 |
| | Innlán | 1.868.966 | 1.767.576 | 1.803.586 |
| | Onnur skuld | 22.711 | 20.420 | 17.507 |
| | Tíðaravmarkingar | 289 | 1.522 | 251 |
| | **Skuld tilsamans** | **1.891.978** | **1.789.533** | **1.821.344** |
| | | | | |
| | **Avsetingar** | | | |
| | Avsetingar til eftirløn o.a. | 2.208 | 2.302 | 2.208 |
| | Avsetingar til tap upp á ábyrgdir | 181 | 189 | 189 |
| | Aðrar avsetingar | 0 | 147 | 147 |
| | **Avsetingar tilsamans** | **2.389** | **2.638** | **2.544** |
| | | | | |
| | **Eftirstillað kapitalinnskot** | **25.500** | **51.285** | **25.500** |
| | | | | |
| | **Eginpeningur** | | | |
| | Ábyrgdarpeningur | 14.279 | 8.988 | 10.727 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 163.548 | 152.768 | 152.918 |
| | Úrslit eftir skatt | 6.193 | 7.176 | 10.360 |
| | Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | 541 |
| | Gávugrunnur | 300 | 150 | 300 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **184.320** | **169.082** | **175.116** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.104.188** | **2.012.538** | **2.024.504** |

8 Aðrar skyldur

# Útgreining av eginpeningi og solvenstørvi

| | 2015<br>1.000 DKK | 2014<br>1.000 DKK | Ársendi 2014<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| **Kapitalflytingar** | | | |
| Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 10.727 | 8.182 | 8.182 |
| Tilgongd | 3.633 | 971 | 2.713 |
| Frágongd | -81 | -165 | -168 |
| **Ábyrgdarpeningur tilsamans** | **14.279** | **8.988** | **10.727** |
| | | | |
| Flutt avlop við ársbyrjan | 163.548 | 152.768 | 152.768 |
| Flutt frá gávugrunni, brúkt í árinum | 0 | 0 | 150 |
| Flutt úrslit | 6.193 | 7.176 | 10.630 |
| **Flutt avlop tilsamans** | **169.741** | **159.944** | **163.548** |
| | | | |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | 541 |
| Gávugrunnur | 300 | 150 | 300 |
| **Eginpeningur tilsamans** | **184.320** | **169.082** | **175.116** |
| | | | |
| **Kapital- og solvensuppgerð** | | | |
| Eginpeningur | 184.320 | 169.082 | 175.116 |
| Hálvársúrslit | -6.193 | -7.176 | 0 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | -541 |
| Hybridur kjarnukapitalur | 0 | 25.785 | 0 |
| **Kjarnukapitalur aftaná frádrøg tilsamans** | **178.127** | **187.691** | **174.575** |
| | | | |
| Eginpeningur | 184.320 | 169.082 | 175.116 |
| Hálvársúrslit | -6.193 | -7.176 | 0 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | -541 |
| Hybridur kjarnukapitalur | 0 | 25.785 | 0 |
| Ábyrgdarlán | 25.500 | 25.500 | 25.500 |
| **Basiskapitalur áðrenn frádrøg tilsamans** | **203.627** | **213.191** | **200.075** |
| | | | |
| Vektað tøl tilsamans | 1.129.015 | 1.138.285 | 1.096.441 |
| Solvensprosent | 18,1 | 18,7 | 18,2 |
| Kjarnukapitalprosent | 15,9 | 16,5 | 15,9 |
| | | | |
| **Uppgerð av solvenstørvi eftir kredittavsetingarháttinum** | | | |
| Kredittváði | 14.861 | 32.416 | 33.393 |
| Marknaðarváði | 2.083 | 5.400 | 3.958 |
| Operationellur váði | 0 | 0 | 0 |
| Annar váði | 1.416 | 0 | 0 |
| Lógarkrøv | 89.893 | 91.063 | 87.715 |
| **Solvenstørvur tilsamans** | **108.253** | **128.879** | **125.066** |
| | | | |
| Solvenstørvur (%) | 9,6 | 11,3 | 11,4 |
| Solvensyvirdekningur (%-stig) | 8,5 | 7,4 | 6,8 |
| Solvensyvirdekningur (%) | 88,5 | 65,5 | 59,6 |

# Lykla- og høvuðstøl

| Lyklatøl | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 18,1 | 18,7 | 18,3 | 16,7 | 15,7 |
| Kjarnukapitalprosent | 15,9 | 16,5 | 18,3 | 16,7 | 15,7 |
| Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | 3,4 | 4,3 | 4,3 | 1,9 | 2,4 |
| Hálvársrenting av eginpeningi aftaná skatt | 3,4 | 4,3 | 1,5 | 2,0 | -5,1 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,2 | 1,3 | 1,2 | 1,1 | 1,14 |
| Rentuváði | 2,9 | 1,7 | 3,0 | 1,7 | 2,5 |
| Gjaldoyrastøða | 0,3 | 0,7 | 0,3 | 0,3 | 0,3 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og niðurskrivingar í mun til innlán | 85,0 | 88,0 | 93,3 | 104,8 | 114,3 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 154,1 | 199,6 | 143,8 | 136,4 | 125,5 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til basiskapital | 50,0 | 39,5 | 56,3 | 83,4 | 90,6 |
| Akkumulerað niðurskrivingarprosent | 2,6 | 2,8 | 3,2 | 3,5 | 3,9 |
| Taps- og niðurskrivingarprosent í hálvárinum | 0,1 | 0,1 | 0,3 | 0,3 | 0,3 |
| Útlánsvøkstur í hálvárinum | 0,8 | 0,6 | 2,5 | -1,4 | -1,8 |
| Útlán í mun til eginpening | 8,4 | 8,9 | 9,4 | 9,0 | 9,2 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 33.246 | 34.266 | 35.186 | 37.500 | 34.975 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 861 | 1.173 | 936 | 787 | 178 |
| **Vanligar inntøkur íalt** | **34.107** | **35.439** | **36.122** | **38.287** | **35.153** |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 25.364 | 26.147 | 25.577 | 27.091 | 27.197 |
| Av- og niðurskrivingar, ítøkilig ogn | 665 | 642 | 636 | 1.336 | 2.047 |
| **Vanligar útreiðslur íalt** | **26.029** | **26.789** | **26.213** | **28.427** | **29.244** |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **8.078** | **8.650** | **9.909** | **9.860** | **5.909** |
| Virðisjavnan | -70 | 960 | 2.418 | -1.284 | 3.801 |
| Av- og niðurskrivingar, skuldarar | 1.815 | 2.433 | 5.230 | 5.242 | 4.839 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **6.193** | **7.177** | **7.097** | **3.334** | **4.871** |
| Skattur | 0 | 0 | 13 | 600 | 765 |
| **Úrslit** | **6.193** | **7.177** | **7.084** | **2.734** | **4.106** |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 1.546.546 | 1.509.603 | 1.517.927 | 1.601.290 | 1.671.468 |
| Virðisbrøv | 221.954 | 207.316 | 191.764 | 189.303 | 340.387 |
| Innlán | 1.868.966 | 1.767.577 | 1.629.931 | 1.586.154 | 1.522.481 |
| Útgivin lánsbrøv | 0 | 0 | 0 | 86.081 | 449.730 |
| Javni | 2.104.188 | 2.012.538 | 1.893.149 | 2.134.987 | 2.229.446 |
| Eginpeningur | 184.320 | 169.082 | 162.039 | 177.736 | 181.375 |
| Ábyrgdir | 52.760 | 49.769 | 43.050 | 45.731 | 40.588 |

# Notur

| Nota | | 2015<br>1.000 DKK | 2014<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 45 | 87 |
| | Útlan | 35.642 | 39.943 |
| | Lánsbrøv | 1.091 | 958 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **36.778** | **40.988** |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 5 | 1 |
| | Innlán | 7.339 | 7.502 |
| | Eftirstillað kapitalinnskot | 1.026 | 2.419 |
| | Aðrar rentuútreiðslur | 0 | 6 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **8.370** | **9.928** |
| 3 | **Kostnaðar- og provisiónsinntøkur** | | |
| | Virðisbrøv og goymsla | 15 | 24 |
| | Gjaldstænastur | 1.008 | 974 |
| | Lánisakskostnaður | 1.395 | 1.166 |
| | Provisión av ábyrgdum | 462 | 429 |
| | Aðrar kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 2.110 | 775 |
| | **Kostnaðar- og provisiónsinntøkur tilsamans** | **4.990** | **3.368** |
| 4 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | -384 | 8 |
| | Partabrøv | 301 | 939 |
| | Gjaldoyra | 12 | 13 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **-71** | **960** |
| 5 | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting** | | |
| | Løn og samsýning til umboðsráð, nevnd og stjórn | | |
| | Stjórn | 1.000 | 883 |
| | Nevnd | 400 | 403 |
| | Umboðsráð | 70 | 75 |
| | **Tilsamans** | **1.470** | **1.361** |
| | **Starvsfólkaútreiðslur** | | |
| | Løn | 9.286 | 9.709 |
| | Eftirløn | 1.658 | 1.666 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 1.730 | 1.792 |
| | **Tilsamans** | **12.674** | **13.167** |
| | Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 9.833 | 10.149 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting tilsamans** | **23.977** | **24.677** |
| | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk | 41,8 | 45,4 |

# Notur

| Nota | | 2015<br>1.000 DKK | 2014<br>1.000 DKK | Ársendi 2014<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | Niðurskrivingar upp á útlán v.m. | | | |
| | **Individuellar niðurskrivingar** | | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 37.079 | 42.910 | 42.910 |
| | Niðurskrivingar upp á útlán | 5.770 | 5.590 | 12.376 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -3.181 | -2.541 | -6.916 |
| | Avskrivað (staðfest tap) | -2.916 | -5.537 | -11.292 |
| | **Akkumuleraðar individuellar niðurskrivingar tilsamans** | **36.921** | **40.422** | **37.079** |
| | Niðurskrivað útlán tilsamans, áðrenn niðurskrivingar | 105.076 | 129.277 | 117.004 |
| | Individuellar niðurskrivingar tilsamans | -36.921 | -40.422 | -37.079 |
| | **Niðurskrivað útlán tilsamans, eftir niðurskrivingar** | **68.155** | **88.855** | **79.925** |
| | **Bólkaðar niðurskrivingar** | | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 5.979 | 6.118 | 6.118 |
| | Niðurskrivingar upp á útlán | 270 | 184 | 1.449 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -893 | -754 | -1.588 |
| | **Akkumuleraðar bólkaðar niðurskrivingar tilsamans** | **5.356** | **5.548** | **5.979** |
| | Niðuskrivað útlán tilsamans, áðrenn niðurskrivingar | 1.483.747 | 1.108.009 | 1.461.044 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar tilsamans | -5.356 | -5.548 | -5.979 |
| | **Niðurskrivað útlán tilsamans, eftir niðurskrivingar** | **1.478.391** | **1.102.461** | **1.455.065** |
| | **Niðurskrivingar tilsamans** | **42.277** | **45.970** | **43.058** |
| | **Individuellar burturleggingar upp á ábyrgdir** | | | |
| | Akkumuleraðar burturleggingar upp á ábyrgdir við ársbyrjan | 189 | 150 | 150 |
| | Burturleggingar í árinum | 0 | 39 | 39 |
| | Afturførdar burturleggingar | 8 | 0 | 0 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar upp á ábyrgdir tilsamans** | **181** | **189** | **189** |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar tilsamans** | **42.458** | **46.159** | **43.247** |

# Notur

| Nota | | 2015<br>1.000 DKK | 2014<br>1.000 DKK | Ársendi 2014<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | Niðurskrivingar upp á útlán (framhald) | | | |
| | **Samanseting til rakstrarroknskapin** | | | |
| | Individuellar niðurskrivingar upp á útlán netto | 2.758 | 3.131 | 5.460 |
| | Individuellar burturleggingar upp á ábyrgdir netto | -8 | -39 | 39 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar netto | -624 | -571 | -139 |
| | Renta av niðurskrivaðum parti av lánum | -751 | -731 | -1.664 |
| | Staðfest tap í árinum, ið ikki áður eru niðurskrivaði | 509 | 688 | 2.808 |
| | Inngoldið til áður avskrivaði krøv | -70 | -45 | -230 |
| | Niðurskrivingar av yvirtiknum ognum | 0 | 0 | 4.605 |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar til rakstrarroknskapin tilsamans** | **1.814** | **2.433** | **10.879** |
| 7 | **Lánsbrøv** | | | |
| | Skrásett á keypsskálum - dagsvirði | 196.370 | 64.851 | 75.810 |
| | Skrásett á keypsskálum - amortiserað kostprís | 15.194 | 128.526 | 133.159 |
| | **Lánsbrøv tilsamans** | **211.564** | **193.377** | **208.969** |
| | Munur á amortiseraðum kostprísi og dagsvirði | 217 | -68 | 447 |
| | **Lánsbrøv til dagsvirði tilsamans** | **211.781** | **193.309** | **209.416** |
| 8 | **Aðrar skyldur uttanfyri javnan** | | | |
| | Fíggjarábyrgdir | 6.220 | 5.922 | 7.123 |
| | Tapsábyrgdir | 5.426 | 3.518 | 4.163 |
| | Aðrar skyldir | 41.114 | 40.329 | 44.297 |
| | **Aðrar skyldir uttanfyri javnan tilsamans** | **52.760** | **49.769** | **55.583** |

www.ns.fo